**Fundarskrá hjá Vestmanna Bygdarráð**
**Bygdarráðsfundur tann 23. oktober 2018, kl. 19$^{00}$**

**Bygdarráðslimir á fundi:** Pauli T. Petersen, Eyðun Hansen, Ingi Olsen, Laila Haldansen, John Zachariassen, Herit Magnussen og Durita á Heygum
**Skrivari:** Maud Poulsen

---

Til viðgerðar fyri **opnari hurð**:

**Mál 108**
Útstykking av neystalendum í grótbrotinum í Stóragerði
J.nr. 01.04.00-10-18

Tekniska Nevnd viðgjørdi á fundi 16. oktober 2018 tilmæli frá teknisku deild um útstykking av neystalendum í grótbrotinum í Stóragerði.
Tekniska deild mælir til at útstykkja sambært korti, dagf. 2. desember 2016. Hetta er sama kort, sum nýtt varð í samband við broyting av byggisamtyktini, tá havnarlendi varð broytt til neystalendi.

Nevndin mælir til at útstykkja sambært tilmæli frá teknisku deild.

**Viðv. 108**
Á fundinum skjeyt Pauli T. Petersen upp at skoyta upp í tilmælið at senda skriv út til umsøkjararnar um, hvussu Vestmanna Kommuna ætlar at skipa stoypingin av neystaveggjunum.

Tilmælið við ískoytinum hjá Paula T. Petersen var einmælt samtykt.

**Mál 109**
Uppskot til avtalu millum Fjølrit og Vestmanna Kommunu
J.nr. 00.17.00-1-18

Fíggjarnevndin viðgjørdi á fundi tann 17. oktober 2018 málið um eina møguliga avtalu millum Fjølrit og Vestmanna Kommunu.

Kommunufelagið hevur vegna kommunurnar samráðst við Fjørit um avtalu um nýtslu av vardum verkum til undirvísingarvirksemi og innanhýsis nýtslu.

Avtalan gevur einstøku skúlunum og stovnunum hjá kommununi samsvarandi ásetingunum í hesi avtalu og samsvarandi lóg um upphavsrætt, rætt til at endurgeva, ljótrita, avrita, fjølrita ella á annan hátt at margfalda eintøk av útgivnum verkum til brúk innan undirvísingarvirksemi, smb. §13 í upphavsrættarlógini.

Nevndin mælir til at undirskriva avtalu við Fjølrit um brúk av upphavsrættarligum tilfari.

**Viðv. 109**
Tilmælið var einmælt samtykt.

Vestmanna, 24. oktober 2018
Pauli T. Petersen, borgarstjóri